gult cyan magenta svart



## DAGSINS MEINING

# Ferðslan og jólini

Hví júst á jólum! Hví skuldi vanlukka henda júst nú? Hetta er spurningur, sum mong av okkum seta nettupp um jóltíðir, tá ein ella onnur vanlukka, oftast í ferðsluni, elvir til skaða ella enn verri deyða. Hvussu oftani hava vit ikki verið vitni til, at tað nettupp hesa gleðishátíð henda óhapp og vanlukkur, sum raka so meint! Sum skilst eru vit enn sloppin undan syndarligum vanlukkum hesi jólini. Men jólini eru ikki av enn. Hektiskir jólainnkeypsdagar eru fyri framman. Fólk, sum eru ov sein á sjóvarfallinum, skulu gera síni innkeyp í síðstu løtu. Tað í sær sjálvum kann skapa grundarlag fyri óhappum og vanlukkum í ferðsluni. Tann øgiliga ferðslan, her serstakliga á stóru plássunum, er eitt ávaringartekin til okkum øll. Ikki minst eiga teir mongu bilførarnir at hava eyguni eftir fólki, sum eru til gongu. Útvarpið visti nú um dagarnar at siga frá, at mongu jólahaldini høvdu ikki havt við sær, at fólk vórðu tikin fyri at hava koyrt ávirkað. Hetta er gott tekin.

Tað er sjálvandi ikki rætt at siga, at summi óhapp og summar vanlukkur eru meira meiningsleys enn aðrar. Tó megu mong av okkum halda og ásanna, at vanlukkur, sum standast av ábyrgdarleysari koyring, eru meira meiningsleysar enn aðrar. Hinvegin vita vit, at akfør eru potientiellir dreparar um ein kann siga tað so. Ein skjóttkoyrandi bilur við einum óvandum og ábyrgdarleysum bilførara er einki minni enn eitt effektivt morðvápn. Um vit vilja tað ella ei. Er rúsur við í leikinum, so vita vit, hvat hann kann føra til. So mong syrgilig dømi eru um, at fólk hava latið lív orsakað av manglandi medviti og ábyrdarloysi hjá tí, sum situr við rættið. Tað er menniskjansligt at gera mistøk verður tikið til. Tað óhepna er tó, at mistøk í ferðsluni kunnu hava mein fyri lívið ella deyðan við sær. Tí er tað at vera bilførari nakað meira, tað er nakað, sum eigur at krevja nakað meira av okkum øllum. Tvs. at við koyrikortinum má og skal fylgja ein eyka ábyrgdarkensla, tí bilurin tú hevur fingið ábyrgdina av, er ein potentiellur drepari, so nógvar kreftir eru uppá spæl.

Manga staðni verður hetta at drepa fólk í ferðsluni ikki mett eins álvarsligt sum tað at skjóta eitt fólk. Men í veruleikanum kunnu hesi bæði tingini samanberast. Tí nógvar deyðsvanlukkur stava frá fullkomnari ábyrgdarleysari koyring. Í Bretlandi viðgera teir í løtuni uppskot, sum skal herða revsingina fyri tey, sum drepa onnur í ferðsluni. Ábyrgdarleys koyring kann í dag verða revsað við 10 ára fongsuli í Bretlandi, men tað er sjáldan, at slíkir dómar verða avsagdir. Nú ætlar stjórnin at krevja av dómstólunum, at ábyrgdarleysir bilførarar, ið drepa fólk í ferðsluni, fáa upp í 10 ára fongsul, tvs. at tað verður nærum mett ájavnt við at taka pistólin fram og skjóta eitt fólk. Latið okkum her heima virða hvør annan, og tað er m.a. við at bera seg rætt at í ferðsluni.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

### Martin Strøm farin

Martin Strøm er deyður 52 ára gamal. Martin er vágbingur og gjørdist kendur um alt landið sum talsmaður fyri vinnurekandi útróðrarmenn fyrsti í nítiárunum. Eitt skifti var hann formaður fyri felagnum Landsfelag Vinnurekandi Útróðrarmanna. Martin hevur ikki verið útróðrarmaður alt lívið. Hann var útbúgvin maskinmeistari og sigldi út fyrstu árini og seinastu árini hevur hann verið við trolaranum Varðborg.

Martin var ikki bangin av sær og tí settu útróðrarmenninir sítt álit á hann. Tað var Martin sum stóð á odda fyri útróðrarverkfallinum tíðliga í hálvfemsunum, og tað var hann sum var talsmaður, tá meginparturin av útróðrarflotanum stevndi til Havnar at mótmæla. Hetta vóru heitir og hendingaríkir dagar.

Martin er sonur Louvisu og Frits Strøm. Frits doyði longu tá Martin var óviti.



## Sosialurin um jólini

Sosialurin kemur út sum vanligt í morgin og tollaksmessudag. Innsent tilfar til blaðið má vera okkum í hendi í seinasta lagi í dag kl 13, um møguleiki skal vera fyri, at tað skal í blaðið fyri jól.

Lýsingar til leygardagsblaðið skulu vera okkum í hendi fyri kl 15 í dag. Lýsingartorgið verður ikki í blaðnum leygardagin, men í staðin í blaðnum í morgin. Blaðið kemur útaftur hósadagin 28. desember.

## Takk

Eg vil hervið siga tykkum hjartaliga takk fyri, at tit veittu mær ta stóru gleði so fjølment at koma saman at hátíðarhalda 90 ára føðingardag mín. Til skulu vita, at eg kendi tað sum vinar- og ættarbond gjørdust vakrari og sterkari millum hesi 4 ættarliðini, ið umboðað vóru.

Somuleiðis takki eg øllum tykkum, sum í aðrar mátar settu okkum hátíðardám á dagin.

So skal eg ynskja tykkum øllum, slekt, vinum og kenningum, nær og fjar gleðilig jól og nýggjár.
Gud vælsigni tykkum øll somul.

**Marius Absalonsen**

## Tøkk

Hjartaliga takki eg tykkum, sum mintust meg á 70 ára føðingardegnum. Gleðilig jól og gott nýggjár.

Ynskir
**Mona Dahl Olsen**

## Ein tøkk

Hjartaliga takk til øll tykkum, sum á ymsan hátt gleddu meg á 90 ára degi mínum.

Eisini verður ynskt øllum vinum og kenningum eini gleðilig jól og Guds vælsigning í komandi tíðum.

Ynskir
**Adolf Olsen**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið sýndu samkenslu, tá elskaða kona, systir og svigarinda okkara

**TONI S. SAMUELSEN**
Tórshavn

doyði og varð jarðað.

Takk øll tit, sum fylgdu henni til seinasta hvíldarstaðin her á fold. Takk fyri blómur og kransar, fyri vitjanir og uppringingar. Takk til talarar, sangarar og samkomuna í Ebenezer. Og annars øllum tykkum, sum veittu eina hjálpandi hond í sambandi við jarðarferðina, takka vit hjartaliga.

Tykkum øllum ynskja vit eini gleðilig jól og Harrans signing í komandi ári.

*Fyri tey avvarðandi*
**Dánjal**

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



# 15.000 kr. til Barnadeildina

**Ágóðin higartil av plakatini hjá áhugabólkinum »Vælskapt Brek« varð fyrrapartin týsdagin handaður barnadeildini á Landssjúkrahúsinum.**

Týsdagin fekk barnadeildin á Landssjúkrahúsinum eina kærkomna jólagávu, tá ein kekkur upp á 15.000 krónur varð latin deildini.

Hesin kekkur var ágóðin higartil av seldu plakatini í sambandi við tiltakið »Vælskapt Brek«. Seld eru 300 av teimum 1.000 prentaðu eintøkunum av plakatini.

Í sambandi við fløguútgávuna »Vælskapt Brek« í november mánaði læt áhugabólkurin prentað eina plakat, ið er kápumyndin á fløguni, ið listamaðurin Eli Smith hevur gjørt.

### Gott ískoyti

– Tað er serliga tørvin hjá teimum brekaðu børnunum, vit hava í huga, tá vit nú lata henda kekkin, sigur Lis Eklund í Niðristovu frá áhugabólkinum »Vælskapt Brek«.

– Ofta hava hesi tørv á serligum leikum, ið kunnu kosta eitt sindur, og tí vildu vit lætta um hjá barnadeildini, ið annars ger nógv fyri eisini hesi børnini.

Fyri barnadeildina tóku deildarsjúkrasystirin Tove Thomsen og yvirlæknin Oddmar Færø ímóti kekkinum.

– Vit eru glað fyri eitt og hvørt ískoyti vit kunnu fáa, tí tørvur er altíð á meira pengum her, sigur Oddmar Færø.

– Tað kemur meira enn so fyri, at vit fáa óvæntaðar gávur sum hesa, og tær koma altíð líka væl við.

### Fleiri kekkar

Umframt at ágóðin av plakatsøluni nú er komin barnadeildini á Landssjúkrahúsinum til góðar, er ætlanin, at sølan av fløguni skal geva gott íkast til enn eitt gott endamál.



*Lis Eklund í Niðristovu, sum fyri áhugabólkin »Vælskapt Brek« handaði barnadeildini kekkin, og deildarsjúkrasysturin Tove Thomsen og yvirlæknin Oddmar Færø tóku ímóti*

Eina ferð tíðliga komandi vár fer áhugabólkurin »Vælskapt Brek« at handa Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum, MBF, og Ítróttarsambandinum fyri brekað, ÍSB, hvør sín kekk.

Hvussu stórir hesi kekkar eru, er enn ikki greitt, men heldur fløgan fram við at fáa ta framúr móttøku, hon higartil hevur fingið, hava glaðu keypararnir gjørt sítt til, at talan verður um heilt fittar upphæddir.

Fløgan fæst framvegis kring alt landið — bæði á posthúsum, keypsamtøkum og har fólk annars vanliga keypa tónleik.

# Tríggir mans skuldsettir fyri harðskap

HARÐSKAPUR
*Áki Bertholdsen*

Tað var rættiligt rok uttan fyri náttklubban, Casablanca í Havn sunnunáttina. Bardagi tók seg upp ímillum fleiri mans. Men tað er ikki lætt at fáa greiði á, hvat veruliga fór fram og løgreglan er ikki serliga hjálpsom við smálutum um hendingina. Í fyrra lagi eru kanningarnar komnar alt ov stutt og í øðrum lagi hevði tað verið brot á tagnarskyldina.

Men Jón Klein Olsen á politistøðini, sigur, at nú avtornar, eru tríggir mans skuldsettir fyri harðskap eftir ófrið uttanfyri Casablanca sunnunáttina.

Talan er um ein 55 ára gamlan mann og tveir 21 ára gamlir mans og málið ímóti teimum gongur so sína gongd.

Politisturin sigur, at tað er ikki lætt at fáa greiði á, hvat er hent, tí nógv vitni skulu avhoyrast.

Men fyribilskanningarnar benda á, at tað sum førdi til ófriðin, var, at teir báðir 21 ára gomlu høvdu ætlað sær inn í Casablanca, men at teir ikki sluppu inn, tí at taðvar fult.

Meiri kann politiið ikki siga um tað, sum hendi. Men Jón Klein Olsen sigur, at hald er lagt á eitt sleggjuskaft, sum varð brúkt í harðskapinum.

Sum kunnugt er tað Mouldi Manai, sum eigur Casablanca.

Og eftir at hann týsdagin hevði greitt okkum frá sínari søgu, hava rættiliga nógv fólk gjørt vart við seg, tí tey siga, at tað, sum hann greiðir frá, er ikki í samsvari við veruleikan.

Reyði tráðurin í tí, sum sagt verður, er, at tað var ikki Mouldi Manai, sum var avbukaður. Tvørturímóti var tað hann, sum legði á við einum træskafti.

Sostatt sigur hvør sína søgu og tí er tað trupult at fáa greiði á, hvat veruliga er hent. Men frá góðum keldum hava vit fingið at vita, at tann 55 ára gamli maðurin, sum er skuldsettur fyri harðskap, er sjálvur Mouldi Manai. Aðrar keldur hava upplýst fyri okkum, at tað, sum í stuttum fór fram, var, at fyrst var Mouldi Manai drigin út í tún og bukaður. Men aftaná kom hann útaftur og legði á hinar báðar við einum sleggjuskafti.

Í samrøðu við Sosialin nú, viðgongur hann eisini, at hann hevur verið eftir monnunum við sleggjuskaftinum og at hann hevði sligið teir við tí - men hinir slóu eisini...

Tað, sum rætturin nú skal taka støðu til, er m.a. um hann gjørdi tað í neyðverju, tí hann føldi seg hóttan, ella ikki, ella um tað var hann, sum leyp á.

